# 40% færri skulu doyggja

**Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur gjørt eitt drúgvt áliti um ferðslu, sum ráðið vil hava landsstýrismannin í ferðslumálum at leggja fyri tingið**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Miðaltalið á teimum, sum doyggja ella verða álvarliga meidd í ferðsluni í Føroyum, skal lækka í minsta lagi 40% komandi tíggju árini.

Hetta er vakra endamálið, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd heldur eigur at verða ávegis stavnhaldið í føroyska ferðslutrygdarpolitikkinum.

Ferðslutrygd hevur lagt drúgt álit fyri landsstýrismannum í vinnumálum, Bjarna Djurholm. Ynskið hjá ferðslutrygd er, at landsstýrismaðurin leggur hetta uppskot fram fyri Føroya Løgting til samtyktar. Álitið nevnist »Ávegis til Nullhugsjónina«.

Tað eru nøkur á síðani, at Ferðslutrygd fór at arbeiða null-hugsjónini, sum í stuttum merkir,

- at eingin skal doyggja ella fáa álvarligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini
- at alt virksemi, sum hevur við ferðslu at gera, skal vera í samljóði við hetta stavnhald

Ferðslutrygd sigur í álitinum, at fyri at náa málinum við null-hugsjónini, so er neyðugt við munagóðum og miðvísum ábøtum bæði á kommunalar vegir og landsvegir, so teir alsamt verða tryggari.

Miðað eigur eisini framhaldandi at verða eftir at akførini verða útgjørd við nýggjastu trygdarfyriskipanum, og at tey lúka fremstu trygdarkrøv.

Ferðslulógin má alsamt verða endurnýggjað, samstundis sum eftirlitið við ferðsluni verður styrkt.

Dentur eigur áhaldandi at vera lagdur á upplýsing og upplæring og at menna ein ferðslutryggan hugburð.

Tað er ikki av tilvild, at Ferðslutrygd tosar um »ávegis stavnhald«. Ráðið viðgongur, at ikki slepst undan, at fólk líða í ferðsluni, men Ferðslutrygd leggur dent á, at tað hevur stóran týdning at miða ímóti einum máli – og málið komandi tíggju skal sambært Ferðslutrygd verða, at miðaltálið á teimum, sum doyggja ella verða álvarsliga meidd í ferðsluni í Føroyum, skal lækka í minsta lagi 40% komandi 10 árini.



*Hesi vóru sera heppin at sleppa frá hesi ferðsluvanlukkuni við lívinu. Tey sótu í bilbelti, sum bjargaði teimum…*
*savnsmynd: Sosialurin*

## Ferðsluvanlukkur: 200 mió kr um árið

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

Við støði í hagtalstilfari vísir Ferðslutrygd á størstu vandamálini í ferðsluni í Føroyum:

- Vanlukkur, ið standast av, at 18-19 ára gamlir dreingir við koyrikorti stytta sær stundir í bili smana við javnaldrum og serliga gentum niður í 14-15 ára aldur.

Tær allarflestu av hesum vanlukkum standast av tí, at bilførararnir eru óroyndir, og at ferðin mangan er alt ov stór. Í nógvum førum hevur rúsdrekka eisini verið nýtt.

- Gongufólk, sum verða koyrt yvir. Serstakliga børn og eldri fólk.
- Vantandi nýtsla av bilbelti. Hetta er galdandi fyri allar aldursbólkar. Mangan sæst, at ungir bilførarar, i hava látið lív ella eru vorðnir avlamnir í vanlukku, sótu ikki í bilbelti.

Samanumtikið heldur Ferðslutrygd,at ferðsluvanlukkurnar í Føroyum henda, tá ið fólk halda væl til standa, veðrið er gott, vegurin góður, bilurin góður – og so verður spitarin trýstur í botn!





# Framkomna verkstaðið á Sandvíkarhjalla

**Plátu- og lakkverkstaðið hjá Hans Jacob Kollsker á Sandvíkarhjalla er eitt nútímans verkstað, við øllum teimum tænastum, ið einum slíkum hoyrir til**




*Manningin á Bilverkstaðnum hjá Hans Jacob Kollsker: Fróði Thomasen, Hans Jacob Kollsker, Jan Jacobsen, Petur Olivur Splidt og Poul Hansen*

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Hans Jacob Kollsker byrjaði verkstað sítt á Hálsi í Havn í 1993. 1996 flutti hann út í Slættanesgøtu, og í fjør bygdi hann egnan verkstað á Sandvíkarhjalla. Eitt stutt skifti, meðan høllin á Hjalla varð bygd, húsaðist verkstaðurin á Signabø í Kollafirði.

Síðani Hans Jacob Kollsker byrjaði einsamallur á Hálsi, er virksemið alsamt vaksið. Í dag arbeiða seks mans á verkstaðnum, tó bert fimm í løtuni.

Á verkstaðnum hjá Hans Jacob Kollsker verða allir skaðar umvældir.

– Vit gera nógvar tryggingarskaðar, og vit hava fleiri bilhandlarar sum fastar kundar, sigur Hans Jacob Kollsker.

Verkstaðurin er tann í landinum, sum ger næstflestar tryggingarskaðar, og tað man boða frá góðsku.

Hans Jacob Kollsker sigur, at tóat umvælingarnar eru størsti partuin, ið gjørdur verður á verkstaðnum, so bjóða teir seg eisini fram, tá talan er um mekaniskt arbeiði.

– Vit ræðast heldur ikki óvanligar uppgávur, um kundin ynskir tað, sigur hann, og leggur afturat, at teir altíð eru til reiðaur, hvussu »lítið« arbeiðið enn er. So um tú ynskri at bilurin skal eftirhyggjast, tí hann skal til sýn ella hava aðra umvæling, so eru teir á Sandvíkarhjalla tilreiðar.

Verkstaðið á Sandvíkarhjalla hevur eisini størstu sproytikabinu í landinum, og tí hava teir sera góðar umstøður til at spoyta størri vørubilar. Kabinan er tó ikki so stór, at hon kann hýsa bussum og lastbilum, men Hans Jacob Kollsker hevur ætlanir um at gera umstøður til at sproyta bussar og lastbilar – og hann hevur longu sproytað fleiri av bussunum hjá Bygdarleiðum.

Nógv verður í dag tosað um, hvussu heilsu- og umhvørvisskaðiligt billakk er, og tí verður nógv granskað í hesi vinnu. Eitt tað síðsta er, at nú fæst vatnbaserað lakk til bilar.

– Enn er bara talan um forlakk, men vit hava havt fólk á skeiði í at nýta hetta nýggja slagið av lakki, sigur Hans Jacob Kollsker. Hann sigur annars, at tað lakki, teir nýta mest í dag, er nógv umhvørvisvinarligari, enn tað var fyrr, tí nú eru ikki so nógv upploysingarevni í lakkinum longur.

Umframt at vera stór, so er sproytukabinan eisini útgjørd við infrareyðum lampum, so til ber at hita upp partar av bilum ella smáar lutir, uttan at hita upp alla kabinuna. Hetta léttir nógv um mannagongdina, tí tað tekur nógv styttri tíð, og tí fæst meira arbeiði ígjøgnum.

Á verkstaðnum hava teir drúgvar royndir við lakkeringsuppgávum, og tí kunnu teir átaka sær so at siga allar lakkeringsuppgávur. Til stuttleika kann nevnast, at teir m. a. hava sproytað bingjur til Eimskip og oljutunnur til Kall, ið nýttar vóru til herferðina »Frælsi í dós«.

Bilverkstaðið hjá Hans J. Kollsker umboðar eisini bilmerkið SsangYong. Hetta umboð tók verkstaðið yvir, tá Sp/F John P. Vilhelm legði saman við P/F Meinhardt Arge í 2001.

Talan er um tríggjar ymiskar fýrahjálsdrivnar SsangYong-bilar. Rexton, Musso og Korando. Teir fáast í ymsum sniði og við ymsari eykaútgerð.


NÝGGJUR JEEPUR Í FØROYUM



REXTON RX290

TURBO DIESEL VØRUBILUR
frá kr. 269.259,- u/mvg

TURBO DIESEL PERSÓNBILUR
frá kr. 359.870,- u/mvg

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn